**Kunning um "Brandvenjing í Skúlanum við Løgmannabreyt"**
**Týsdagin 9. apríl kl. 10.15**

Venjingin fer soleiðis fram:
Eftir fríkorterið kl. 9:50 verður, sum vant, farið til 3. tíma og undirvíst verður eftir tímatalvuni. Tað einasta, sum er óvanligt, er at næmingarnir hava skógvarnar við sær inn í stovuna og møguliga jakka.

Kl. 10.15 fer brandávaringin í gongd. Brandávaringin hoyrist eisini á brandstøðini, sum sjálvsagt er vitandi um, at talan er um eina venjing. Sløkkiliðið tekur eisini lut í venjingini og kemur á staðið við fullum útrykningi.

Skúlin hevur fyrireikað eina "Brand- og rýmingarætlan" har greitt er tilskilað, hvussu øll skulu bera seg at í ymiskum støðum. Sum dømi kann nevnast, at lærararnir sum skjótast skulu fáa næmingarnar út í tún gjøgnum neyðdyrnar. Eftirsum, at tað er ein venjing, sleppa næmingarnir at lata seg í skógvar og jakka.

Næmingarnir skulu síðani stilla seg í rað og standa í somu røð, sum er í protokollini. Tá ið talt er upp, verður við vanligum gongulag farið oman á Hoyvíksvøllin, har alarmsavningarstað skúlans er.

Tá ið royndin er gjørd, fara næmingar og lærarar aftur í skúlastovurnar. Í flokkunum verður brandvenjingin eftirmett, við m.a. at næmingar fáa høvi at seta orð á kenslur, eygleiðingar og upplivingar. Seinni fara lærarar, trygdarbólkur og leiðsla eisini at eftirmeta.

Ikki er óhugsandi, at næmingar verða tíðindafróðir, tá í teir koma heim henda dagin og tí er gott, um foreldur taka væl í móti práti um hetta.

Vinarliga leiðslan